# Álit

**í**

**løgtingsmáli nr. 97/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum**
(Ásetingar í sambandi við kanningar av vanlukkum á sjónum, talgilt samskifti, sjóuppmerking, gjald fyri sýn o.a.)

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og vinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 21. mars 2024 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. apríl 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í uttanríkis- og vinnumálum Høgna Hoydal.

Í høvuðsheitum er talan um 4 broytingar í galdandi lóg um trygd á sjónum.

Heimildin til at stovna neyðugar siglingarleiðir og sjóuppmerkingar er ein natúrligur partur av, at økini sjóuppmerking og vitaverk formliga verða yvirtikin 1. juni 2024.

Landsstýrisfólkinum ella tí myndugleika, landsstýrisfólkið gevur heimild til tess, verður heimilað at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerking og at halda tær við líka við tí endamáli at fremja trygga ferðslu á sjónum.

Heimild at áseta reglur um talgilt samskifti er eisini ein natúrlig fylgja av, at so at siga alt samskifti í dag er talgilt, og at Sjóvinnustýrið seinastu árini hevur ment tryggar og nútíðarhóskandi elektroniskar skipanir til brúkaran.

Eisini fær landsstýrisfólkið heimild at gera nærri reglur um eina generella fráboðanarskyldu av vanlukkum á sjónum til Sjóvinnustýrið.

Endamálið við broytingini er at gera tað greiðari, at munur kann vera á kanningum av sera álvarsomum vanlukkum og øðrum vanlukkukanningum.

Tí verður § 19 b nágreinað til tess at staðfesta, at hon bara er galdandi fyri kanningar, sum verða gjørdar sambært altjóða koduni. Sera álvarsligar vanlukkur eru sambært koduni vanlukkur, har skip er sokkið, onkur hevur latið lív ella umfatandi umhvørvisdálking er hend. Kanningar sambært koduni hava bert til endamáls at staðfesta orsøkina til vanlukkuna. Sum galdandi § 19 b er orðað, eru allar kanningar av vanlukkum á sjónum fevndar av regluni og ikki bara kanningar, sum eru fevndar av koduni.

§ 13, stk. 2 verður broytt soleiðis, at verandi heimild í § 13 um, at landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um kanningar av vanlukkum á sjónum verður víðkað og nágreinað til, at hendan heimild eisini fevnir um at áseta reglur um eina generella skyldu at boða Sjóvinnustýrinum frá um vanlukkur.

Í samband við broytingarnar í § 47, har landsstýrismanninum verður heimilað at gera nærri reglur um gjald fyri sýn, sum Sjóvinnustýrið ger, hevur nevndin hesar viðmerkingar.

Eftir galdandi reglum eru sýn, eftirlit, góðkenningar o.a, sum Sjóvinnustýrið ger, ókeypis.

Talan er í høvuðsheitum um smærri før undir 24 metrar, alibátar/útgerð og fóðurflakar, smærri ferðafólkabátar v.m.

Nevndin heldur, at tað er rímiligt, at Sjóvinnustýrið fær eina heimild at taka gjøld fyri sýn v.m., men at vit eiga at halda fast við prinsippið um, at 1. sýnið skal vera ókeypis.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Í § 1, nr. 7 verður í § 47 aftaná stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3*. Fyrsta sýn er ókeypis".
Stk. 3 og 4 verða eftir hetta stk. 4. og 5.

Viðmerkingar:
Við hesum verður staðfest, at 1. sýnið framhaldandi skal vera ókeypis, men at takast kann eitt gjald, sum í mesta lagi svarar til ta útreiðslu, ið stendst av at fremja hetta, t.v.s umsýni.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur nevndin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 6. mai 2024**

| | | |
|---|---|---|
| Erhard Joensen<br>formaður | Annika Olsen<br>næstforkvinna | Eyðdis Hartmann Niclasen |
| Jørgen Niclasen | Árni Skaale | Uni Holm Johannesen |
| | Karlot Hergeirsson | |